Sigga í Hoyvík í Smiðjuni

Hóskvøldið 5.juli kl. 19.00 - 21.00 verður fernisering í Smiðjuni í Lítluvík í sambandi við at málarin Sigga í Hoyvík letur upp eina listaframsýning.

Sigga, ið er 26 ára gomul, er úr Havn og býr á Amager. Hetta er hennara triðja framsýning í Smiðjuni. Hon hevur eisini havt framsýningar í Danmark.

Á framsýningini eru ellivu sera litríkir figurativir og abstraktir oljumálingar.

Myndevnini er fyri tað mesta kvinnur.

Framsýning verður opin til og við mikudagin 11. juli, allar dagar frá kl. 15-19 uttan týsdagin 10. juli, tá opið er frá kl. 15-17.

Í hesum døgum hevur Sigga í Hoyvík listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík

Mynd: Magnus Gunnarsson

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
Sosialurin
www.sosialurin.fo

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu samkenslu í stóru sorg okkara, tá elskaði maður mín og góði pápi okkara, verpápi og abbi,

Niels Juel Arge
fyrrv. klokkari
Klaksvík

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk fyri troystarík orð í kapellinum og í kirkjuni.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar og gravara.
Tøkk til tykkum, sum hjálptu til við ervinum.

Tøkk fyri vitjanir, heilsanir, uppringingar, blómur, kransar og peningagávur til Emmaus.

Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

Vegna familjuna
Eia,
Sigga, Petra, Andrias og Karina

Saknurin er stórur
Takk fyri kærleika, umsorgan og ógloymandi minnir!

Lydia av Teigum 60 ár

Mánadagin 2. juli fylti ein kend Klakvíkskvinna í Havn 60 ár.

Lydia av Teigum er fødd í Klaksvík, dóttir Martin Sofus Poulsen (1907-1995) úr Svínáum, skúlalærara í Klaksvík, og Johanna Andrea Sedea f. Andreasen (1911-2000) úr Oyndarfirði. Lydia er næstyngst av átta systkjum, harav 3 av teimum ikki longur eru á lívi. Systkini hjá Lydiu vóru Poul Bernhard (1933-1933), Hans (1934), Freydis (1936), Mathilda (1938), Jovina (1939-1998) Jonhild (1942) og Odmar (1952-1992).

Lydia er útbúgvin sum skrivstovukvinna og hevur drúgvar royndir á økinum. Umframt at hava arbeitt í politinum, hevur hon verið á Húsalánsgrunninum, Dómaraskrivstovuni og Fossbankanum umframt at hon í 9 arbeiddi í Danmark.

Lydia hevur 25 ára starvsdag hjá politinum sunnudagin og tað fara vit eisini at ynskja henni tillukku við.

Lydia er skrivstovuleiðari á Avgreiðsludeildini, har hon m.a. hevur skrásetingina hjá politinum undir hond, umframt at hon røkir fleiri aðrar uppgávur m.a. skrivarauppgávur.

Hon er nógv avhildin av øllum í politinum. Hevur holla fakliga vitan og er eitt arbeiðsgrev av teimum fáu. At hon so eisini er sera fyrikomandi og hjálpsom ger, at nógv verður leitað til hennara fyri at fáa hjálp til alt millum himmal og jørð. Og tað ger Lydia fegin, hon elskar at vera nakað fyri onnur og ger tað við gleði. Lydia hevur eisini ein einastandandi vilja til at fjálga um onnur og tað hevur eisini viðført stóran trivna og gleði á okkara arbeiðsplássi.

Lydia eigur 5 børn: Jógvan Martin (1968), Súsanna (1972), Finnbjørn (1973), Halldóra (1974) og Sigmundur (1975). Tá børnini eisini hava verið líka røsk at eiga børn, eigur Lydia 10 ommubørn og sum hon gongur uppí við lív og sál.

Lydia býr í Tórsahvn saman við Bjarna Garðshorn úr Elduvík. Við hesum fara vit at ynskja Lydiu hjartaliga tillukku við degnum og tykkum báðum alt tað besta framyvir saman við børnum og ommu- og abbabørnum.

Starvsfelagarnir

Professionsbachelorar fingið prógv

Tann 28. juni 2007 fingu hesar prógv sum "Professionsbachelor som Pædagog" á Danner Seminariet í Jægerspris í Danmark.

Á myndini eru f.v.: Annika Juul, Tórshavn, Beinta Seyer Joensen, Tórshavn, Majbritt Poulsen, Vatnsoyrar, Charlotta á For, Nes, Unn Eldevig Petersen, Fuglafjørður, Marsanna Eikholm, Hvalvík, Jana Thomassen Egholm, Sørvágur, og Dagbjørt Olavsdóttir Hansen, Norðragøta

Per N. Persson 60 ár

23. juni fylti Per Niels Persson, politistur í Tórshavn 60 ár.

Per er føddur á Tvøroyri sum triði av sjey systkjum hjá Børge Persson (1921-1982) frá Tvøroyri og Mary f. Thorsteinsson (1922-2004) á Brúgv í Trongisvági. Hini systkini eru Anna Maria f. 1944, Carl f. 1946, Echardt f. 1950, Manne f. 1952, Poli f. 1954 og Elin f. 1957.

Per var upprunaliga skrivstovumaður til hann 1. februar 1973 fór at politiskúla í Keypmannahavn. Eftir lokna útbúgving varð hann settur politistur í Tórshavn.

Hann hevur helst meiri enn nakar annar luttikið í felagsarbeiðinum í Føroya Politistafelag, har hann eisini hevur verið formaður í heili 15 ár, til hann fyri fáum árum síðani ynskti at leggja hetta álitisarbeiði niður og stillaði ikki uppaftur. Soleiðis hevur hann lagt nógv eftir seg í hesum álitisstarvi til gagns fyri felagið og limir tess.

Einki er at ivast í, at nógv av frítíðini hjá Per er farin til fakfelagsarbeiði og vilja vit tí eisini frambera okkara tøkk fyri tað arbeiðið, sum tú útinti á henda hátt.

Felagsarbeiðið var heldur ikki ókent fyri Per. Áðrenn hann kom í politiið, og eftir at hann kom heim aftur, var hann í nevndini á Havnar Fimleikarfelag í samfull 26 ár, harav 14 ár, sum formaður felagsins.

Per er knýttur at Avgreiðsludeildini hjá politinum, har hann burturav røkir uppgávuna við loyvum v.m., sum m.a. ber í sær viðgerð av umsóknum um matstovu-, skeinki,- dansi,- og hissiniloyvir.

Per er giftur við Óluvu f. Mohr, úr Tórshavn, dóttir Tórálvur Mohr og Olgu í Dímum. Per og Óluva eiga tvey børn Arnóru f. 1982 og Tórálvur f. 1988.

Vit vilja á henda hátt ynskja Per og familiuni hjartaliga tillukku við 60 ára degnum og takka fyri gott samstarv í tíðini, sum farin er.

Starvsfelagarnir